# Sparingarnar einki við blokkin at gera

**Fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen, heldur, at niðurskurðurin í blokkískoytinum, sum undanfarna samgonga fekk í lag, einki hevur at gera við tær sparingar, sum nú verða gjørdar innan tað almenna**

ANDSTØÐAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


*Fyrrverandi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, vísir aftur, at nakað samband er millum blokkniðurskurðin og almennu sparingarnar*
*Savnsmynd*

Nú tað verður spart innan tað almenna, eru tað nógv, sum halda, at hevði undanfarna samgonga ikki valt at skerja blokkin, varð sloppið undan teimum sparingum, sum nú verða gjørdar. Hesum er fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen, tó ikki samdur í, og hann heldur framferðarháttin hjá núverandi samgongu verða alt annað enn virðiligan.

## Ódámligur framferðarháttur

Karsten Hansen sigur, at hann heldur tað verða sera óheppið, at landsstýrið alment meldar út, at skerjingar verða gjørdar innan tað almenna, og at 10 prosent skulu sparast, áðrenn man hevur tosað við teir bólkar, ið verða raktir av hesum skerjingum.

– Slíkar útmeldingar gera fólk ótrygg. Vit brúktu nógva tíð og orku uppá ikki at koma við útmeldingum, sum ikki vóru væl fyrireikaðar og gjølla umhugsaðar.

Útmeldingarnar hjá hesum landsstýrinum gera, at eingin veit hvør skal sigast upp. Tískil ganga fólk bara og bíða eftir degnum, har ein og ein verður róptur inn at fáa deyðadómin, og tað er als ikki virðiligt, sigur Karsten Hansen.

– Vit ætlaðu ongantíð at fara út við slíkum fyribilsloysnum og sagt 20 fólkum upp her og 10 har. Heldur vildu vit gjørt tingini virðiligt við at fyrireika tað, og síðani boða frá, at nú bleiv tað og tað økið rationaliserað, og tí var til dømis neyðugt at siga fýra fólkum úr starvi, sigur fyrrverandi landsstýrismaðurin.

– Tann rætti mátin hevði verið at farið fram, soleiðis sum vit gjørdu tað í sambandi við toll-automatiseringina. Vit gjørdu eina ætlan við stigvísum rationaliseringum, og tað kostaði tvey árverk fyrsta árið, fýra í fjør og fimm í ár. Tær rationaliseringarnar gjørdu vit, og teir heysta sparingarnar, sigur Karsten Hansen.

## Ætlaði at endurskoða miðfyrisitingina

Fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin greiðir frá, at frá fyrsta deg hann kom í landsstýrið, arbeiddi hann av øllum alvi fyri at fáa pengar til at seta ein bólk, sum kundi fara runt í allari skipanini og endurskoða hana.

– Teir pengarnar, sum eg bað um, fekk eg ikki fyrr enn tað síðsta árið, so tað kom ongantíð av álvara í gongd. Ætlanin var, at tvey fólk skuldu gjøgnumganga alla miðfyrisitingina og koma við uppskotum til rationalisering. Ætlanin var millum annað, at tað eisini skuldu verða eygu uttanífrá, sum komu inn og hugdu at skipanini, sigur Karsten Hansen.

Somuleiðis sigur fyrrverandi landsstýrismaðurin, at tá ið tjóðveldisflokkurin kom í samgongu í 1998, fekk flokkurin skrivað í samgonguskjalið, at miðfyrisitingin skuldi endurskoðast, tí tað var blivið ov kassaskipað, og hvør gekk og passaði sítt egna kongaríki, sum Karsten Hansen málber seg. – Vit ætlaðu at hava tað meiri tvørgangandi, men tað var nógv mótistøða móti tí í samgonguni, og løgmaður vildi ikki gjøgnumføra tað. Fíggjarmálastýrið gjørdi eina ætlan, men vit fingu skrivliga at vita frá løgmanni, at vit skuldu halda fingrarnar burtur, sigur Karsten Hansen. Harafturat vísir hann á, at júst sambandsflokkurin, sum nú umsitir fíggjarmál, sat við róðrið, tá ið miðfyrisitingin øktist munandi.

## Blokkniðurskurðurin einki samband við sparingarnar

Karsten Hansen heldur tað verða burturvið at siga, at tað er blokkískoyti, sum hevur gjørt, at vit hava havt eitt høgt alment tænastustøði í landinum. – At vit skóru blokkin hevur einki við lækkandi alment tænastustøði at gera. Hyggur tú eftir tænastustøðinum í 80'unum og miðskeiðis í nítiárunum, so er tað ikki á hædd við í dag. Tá var alt tænastustøðið skorið burtur. Blokkurin hevur bara gjørt, at vit føroyingar altíð hava handlað ábyrgdarleyst, sigur Karsten Hansen.

Fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin heldur ikki, at tíðirnar í Føroyum eru so ringar, sum nógv vilja gera tær til. – Tíðirnar eru ikki tær somu sum í 2001, men tíðirnar eru ikki ringar, sigur Karsten Hansen og leggur afturat, at arbeiðsloysið í dag er ikki størri enn tað var í 2001.

## Javnaðarflokkurin vildi hækka fíggjarlógina

Somuleiðis sigur Karsten Hansen, at tá ið Tjóðveldisflokkurin sat í landsstýrinum, var nógv gjørt fyri at styrkja fíggjarstøðu landskassans. – Vit valdu at konsolidera landskassan í góðu tíðunum, og tí gerast tíðirnar ikki so ringar, sum tær til dømis vóru í kreppuni í 90'unum. Javnaðarflokkurin brúkti øgiliga nógva orku upp á at fáa okkum at hækka fíggjarlógina við einari hálvari milliard, tí teir hildu, at vit brúktu ov lítið. Vit søgdu tó nei, tí tíðirnar fóru ikki at standa við, greiðir Karsten Hansen frá.

## Lønarhækkanir kosta ikki tí almenna nógv

Tað hevur fleiri ferðir verið nevnt, at almennu lønarhækkanirnar kosta landskassanum nógv, men hesum er Karsten Hansen ikki samdur í. – Hækkandi lønir kosta ikki tí almenna nógv, tí veksa almennu lønirnar, veksa allar aðrar lønir í samfelagnum tilsvarandi. Hetta merkir eina økta skattainntøku av øllum lønarbólkum, og tí verða tað ikki færri pengar í landskassanum av tí at byrja við, sigur hann.

Karsten Hansen sigur eisini, at tað sær út sum um, at landsstýrið ætlar sær at skerja tað meira útbúna fólkið burtur. – Tað tykist sum um, at jú meiri útbúgving tú hevur, jú størri er vandin fyri at blíva uppsagdur. Tað dugi eg ikki at skija, tí man hevur brúkt nógva orku uppá at fáa fólk meiri útbúgvið og harvið eitt betri virkandi samfelag, sigur hann og leggur afturat, at hann væntar, at tað fer at kosta í hinum endanum.

# Rændu pengaskáp á posthúsinum

**Brotið varð mikunáttina inn á posthúsið á Eiði, og pengaskápið var stolið. Løgreglan handtók tveir mans seinnapartin mikudagin, og annar viðgekk at hava framt innbrotið**

POSTRÁN
*Edvard Joensen*



*Posthúsið á Eiði var stongt mikudagin vegna innbrot*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Innbrot var á posthúsinum á Eiði mikunáttina. Tjóvar fóru avstað við pengaskápinum. Einar 20.000,- krónur í kontantum umframt frímerki og telefonkort fyri einar 55.000,- krónur vóru í skápinum, sigur leiðarin á kriminaldeildini hjá løgregluni. Tveir mans eru handtiknir í samband við innbrotið.

Brotið varð inn gjøgnum eitt vindeyga á posthúsinum, greiddi Bergur í Garði, postverksstjóri frá, seinnapartin mikudagin. Síðan varð pengaskápið tikið á ein sekkjavogn og rullað út gjøgnum høvuðsdyrnar, og síðan flutt burtur. Hildið varð tá, at tað var við bili.

Men Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni, sigur, at okkurt bendir á, at tjóvarnir hava verið frekari enn so. At teir stutt og greitt hava trillað pengaskápið á hesum vogninum til eini hús á Eiði, har teir handtiknu menninir búgva. Síðan hava teir tømt tað og beint tað burtur aftur við bili, sigur hann. Fyri løgregluni hava handtiknu menninir upplýst, at teir hava tveitt tað á sjógv nærindis Funningi. Løgreglan skuldi leita á staðnum seinnapatin hósdagin.

Menninir, sum handtiknir eru, eru 28 og 30 ára gamlir, og kenningar hjá løgregluni, sigur Bergleif Brimvík. Serliga annara er sera góður kenningur, leggur hann afturat. Tá teir vóru handtiknir í Havn mikudagin, høvdu báðir hash uppi á sær, og tá húsarannsókn varð gjørd heima hjá teimum, varð eisini funnið hash, sigur Bergleif Brimvík.

Hann greiðir frá at løgreglan beinanveg, farið var at kanna húsini, fann sekkjavognin hjá Postvekinum, sum brúktur hevði verið at flyta pengaskápið við. Umframt er tað mesta av tí, sum var í pengaskápinum, eisini komið til høldar, sum hann tekur til.

Tann eldri maðurin hevr viðgingið at hava framt innbrotið, og hin at hava verið við til at beina pengaskápið burtur.



# Fakfelagsrørslan er trongdskygd

**Landstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, heldur, at fakfelagsrørslan er trongdskygd, tí hon ikki vil góðtaka eina lóg, sum tryggjar djóraheilsuni í verkfalstíð. Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther sigur, at landsstýrismaðurin nýtir djóraheilsuna sum undanførslu fyri at skerja verkfalsrættin hjá fakfeløgunum við lóg**

SKERJA VERKFALSRÆTTIN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




*– Tað má hava áhugan hjá øllum, at djórini hava tað gott, meðan verkfall er. Uppskotið tekur fyrst og fremst djóraheilsulig atlit, og tí er tað ov trongdskygt av fakfelagsrørsluni, at hon bert sær uppskotinum sum eina skerjing av verkfalsrættindum, sigur Bjarni Djurholm*

Djóraheilsa ella skerjing av verkfalsrættindinum.

Hetta er tykist at vera ósemjan millum landsstýrismannin í vinnumálum og forkvinnuna í Føroya Arbeiðarafelag.

Í lesarabrævi í Sosialinum í dag brigslar forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, ætlanini hjá landsstýrismanninum um leggja eitt uppskot fyri tingið, sum sambært forkvinnuni brýtur grundleggjandi verkfalsrættindini hjá fakfelagsrørsluni.

Ingeborg Vinther heldur tað vera burturvið, at Bjarni Djurholm ætlar at leggja fram eitt lógaruppskot, sum ikki gevur fakfeløgunum á privata arbeiðsmarknaðinum møguleika at lýsa verkfall, sum rakar alivinnuna.

Hesum vísir Bjarni Djurholm aftur.

– Uppskotið tekur bert fyrilit fyri veterinerum viðurskiftum. Ætlanin er at geva landslæknanum heimild at hjálpa djórum í verkfalstíð, tá djóraheilsan er hótt. Uppskotið tekur fyrst og fremst djóraheilsulig atlit, og er ikki ætlað sum ein skerjing av verkfalsrættindunum, sigur Bjarni Djurholm.

Vinnumálaráðið hevur arbeitt við uppskotinum í eitt gott ár. Landsstýrismaðurin vísir á, at uppskotið er ikki bert ætlað alifiski, men djórum sum heild.

## Á tekniborðinum

Bjarni Djurholm greiðir frá, at uppskotið hevur ikki verið til umrøðu í landsstýrinum enn, og tískil ber ikki til at siga um uppskotið verður lagt fyri tingið. Hann vísir á, at Føroyar hava eisini eina skyldu mótvegis útheiminum at fáa skipað viðurskiftini á økinum.

– Tað er ábyrgarleyst, at vit ikk hava skipað viðurskifti á økinum. Ímynda tær um útlendingar fingu frænir av, at eitt nú 20 ross lógu deyð í einum fjósi, tí djóralæknin ikki hevði heimild at fara út, meðan verkfall herjaði landið. Hetta hevði snøgt sagt verið ein vanlukka fyri umdømið hjá okkum uttanlands, heldur Bjarni Djurholm.

Landsstýrismaðurin heldur, at tað er snævurskygt av fakfelagsrørsluni, at hon áhaldandi tvíheldur um, at landsstýrismaðurin tilvitað roynir at skerja verkfalsrættin hjá fakfelagsrørsluni við uppskotinum.

– Tað má hava áhugan hjá øllum, at djórini hava tað gott, meðan verkfall er. Uppskotið tekur fyrst og fremst djóraheilsulig atlit, og tí er tað ov trongdskygt av fakfelagsrørsluni, at hon bert sær uppskotinum sum eina skerjing av verkfalsrættindum.

## Undanførsla

Ingeborg Vinther er rúkandi ósamd við Bjarna Djurholm. Hon heldur lítið um útsagnina hjá landsstýrismanninum um, at fakfelagsrørslan er trongdskygd.

– Djóraheilsan er bert ein undanførsla frá landsstýrismanninum, so hann kann sleppa at skerja rættindini hjá okkum við lóg. Tað er fullkomiliga óneyðugt við einum lógaruppskoti, sum skal tryggja djóraheilsuna, meðan verkfall herjar. Vit vístu undir seinasta verkfalli, at eru trupulleikar, so forða vit sjálvssagt ikki landslæknanum at gera sítt arbeiði, sigur Ingeborg Vinther.

Hon vísir enn einaferð, at ætlanin hjá landsstýrismanninum er eitt greitt brot á demokratisku rættindini hjá fakfelagslimunum.

– Hatta er snøgt sagt ein umbering hjá landsstýrismanninum fyri at ganga áhugamálunum hjá ávísum persónum á møti, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

# Javnaðarfólk kunnast um ES

**Formaðurin í donsku ES-nevndini á Fólkatingi, Claus Larsen Jensen, verður gestarøðari á landsstevnuni hjá Javnaðarflokkinum um vikuskiftið. Javnaðarfólk fara eisini at skifta orð um vend er komin í á politiska pallinum, síðan ABC-samgongan undir Javnaðarfloksins leiðslu tók við í februar mánaði**

LANDSFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– ES hevur staðið fyri umfatandi broytingum seinastu árini, og fólk eru tí forvitin um at fáa meira at vita um felagsskapin.

Katrin Dahl er virkandi skrivari í Javnaðarflokkinum, og hon er við í fyrireikingunum av landsstevnuni hjá Javnaðarflokkinum um vikuskiftið. Javnaðarflokkurin hevur boðið formanninum í donsku ES-nevndini á Fólkatingið, Claus Larsen Jensen, at røða um ES.

– Javnaðarflokkurin hevur søguliga verið ímóti limaskapi í ES, men okkara limir eru áhugaðir at fáa vita fyrimunirnar og vansarnar við ES-limaskapi, og við hollu vitanin hjá Claus Larsen Jensen um ES, vóna vit at fáa nógv burturúr, sigur Katrin Dahl

Claus Larsen Jensen er í dag fyri ES-limaskapi, men fólkatingslimurin hjá Danska Javnaðarflokkinum hevur einaferð í tíðini verið ímóti.

Katrin Dahl væntar tí, at gestarøðarin fer at geva eina fjølbroytta mynd av ES, har fólk veruliga fáa ein mynd av fyrimununum og vansunum við limaskapi í ES

## Temaorðaskifti

Seinnapartin leygardagin skipar Javnaðarflokkurin fyri temaorðaskifti við undirheitinum "Er vend komin í". Hóskandi leggur formaðurin í tingbólki Javnaðarfloksins, Kristian Magnussen leggur fyri í temaorðaskiftinum, tí tað var júst hesin, sum undir valstríðnum átti lagið, "Her skal vend koma í ".

Katrin Dahl greiðir frá, at endamálið við orðaskiftinum er geva løgtingsmonnum Javnaðarfloksins høvið til at greiða frá fyrstu mánaðunum í samgongu, og sannføra veljaran um, at verulig vend er komin í, síðan ABC-samgongan tók við valdið í februar mánaði.

## Forkunnugt undirhald

Fyri fyrstu ferð hevur tað eydnast Javnaðarflokkinum at fáa vælumtókta vísusangaran, Stanley Samuelsen, at standa fyri undirhaldinum. Stanley hevur búleikast í Danmark seinastu mongu árini, og hann er vanliga fastur fúsur at spæla á landsstevnum hjá danska Javnaðarflokkinum og á tiltøkum hjá LO.

Stanley Samuelsen og Nis P. fara bæði at spæla fríggjakvøldið og leygardagin.

Landsstevnan hjá Javnaðarflokkinum verður í Læraraskúlahøllini fríggjadagin og leygardagin.

### FAKTA

**Skráin fyri landsstevnu Javnaðarfloksins 2004**

**Fríggjadagin 24. september**
19.00 Landstevnan verður sett og skipað
- Undirhald við Stanley Samuelsen og Nis P.
- Frágreiðing frá feløgum
- Frágreiðing skrivarans
- Gestarøðari Claus Larsen Jensen
  22.30 Fundur niðurlagdur

**Leygardagin 25. september**
09.00 Fundur uppafturtikin
- Undirhald við Stanley Samuelsen og Nis P.
- Formansfrágreiðing
- Frágreiðing frá landsstýrismanninum Hans Paula Strøm
- Aðalorðaskiftið

**12.00 Matarsteðgur**
- Temaorðaskiftið "Er vend komin í ?" Kristian Magnussen leggur fyri
- Virkisskráin
- Val av starvsnevnd, floksleiðslu og ásetan av limagjaldi
- Ymiskt-innkomin uppskot-landsstevnusamtykt

**17.00 Fundurin endar**